# Budam fylti spæliplássið


Mynd: Sunva E. Lassen

**Budam spældi eftir heimsnavnið Natashu Bedingfield, men hetta tóktist ikki at nerva tíggjumannabólkin, ið bjóðaði áhoyrarunum inn til ein annan heim**

G!
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Spæliplássið í Syðrugøtu plagar at hýsa teimu meira intimu konsertunum.

Staðið var eisini væl valt til ta fangandi framførsluna hjá Búa Dam ella bólkinum, Budam, fríggjakvøldið, tí her vórðu vit leidd inn í ein annan heim. Men har so mikið nógv fólk, at konsertin saktans kundi verið á sandinum.

Síðani Búi Dam fyri nøkrum mánaðum síðani gav sína fløgu út, hava hann og bólkurin spælt rættiliga fitt av konsertum, og tað er týðiligt, at Búa bæði dámar og dugir væl at framføra.

Við sínum serligasøgusigarastíli hevur hann fjøldina í sínum lógva og kann næstan billa fólki tað inn, honum lystir. Fólk vilja hava søgur, og við sínum dárandi og dreymakendu alheimum, veitst tú ikki av fyrr enn tú bergtikin stendur og lurtar eftir hesum søgunum um djevlar, einglar og aðrar verur.

Tað sermerkta við framførsluni hjá Budam er, at á ein hátt heldur tú, at tú hevur hoyrt alt hetta fyrr. Her eru bæði melodiski Leonard Cohen, ein farri av dramatikkinum hjá Regini Dahl og myndaviðgerðin hjá Hitchcock at hóma, samstundis, sum tú ikki ánar, hvat fer at henda í næsta ørindi. Orsøkin er helst, at søgurnar tykjast so frumkendar og alheimsligar, at sangirnir verða mytologiskir, og tað ger teir ikki minni spennandi.

## Góð manning

Sum heild hevur Búi verið sera heppin, tá hann hevur sett bólkin saman. Budam var hetta kvøldið mannaður av heili fimm kvinnum og fimm monnum, og tað ljóðaði sera væl. Kórgenturnar gjørdu eitt valaarbeiði, og framførslan hevði uttan iva verið nógv fátækari uttan teir báðar, Magnus og Kim, á tangentum – tað veri seg á harmoniku, pumpiurgu og øðrum ljóðførum. Og so var bassleikarin, Mikael, dyggur sum altíð.

Búi Dam hevur við hesum nýggja konseptinum vunnið sær eina serstøðu sum eitt heilt serligt innslag í føroyska tónleikaverðini. Hóast røddin viðhvørt er eitt sindur hvøss, so er hon so mikið rá, sannførandi og dragandi, at hetta tykist at rigga væl inn í tónleik og tekst.

Hetta sást ikki minst í tí síðsta valsinum, bólkurin spældi, har fólk funnu saman tvey og tvey og dansaðu.

*Búi Dam er altíð sjarmerandi og dramatiskur í sínum framførslum*

Uttan iva ein av teimum frægaru konsertunum hetta summarið, ið eisini var við til at staðfesta G! sum ein djarvan og dygdarsøkjandi festival.

# Summarsól og sangir í moll

**Teitur er subtilur. Undirdrivin. Hann málar við spøkum litum. Alt hansara konsept byggir á tann einfalda sannleikan, at "less is more".**

UMMÆLI
*Súsanna Olafsdóttir*

Og tað riggar so væl, at kanska eingin føroyskur sangfuglur hevur havt veingir, ið hava borið so væl sum Teitur.

Men hansara stílur krevur meira av áhoyrarunum enn rútmiskt disko ella buldrandi rokkur. Teitur blæsir einki í høvdið á nøkrum. Tað er í øllum førum sera sjáldan. Hann krevur eitt sindur av áhoyrarunum; at tey ikki bara eru til staðar, men at tey lurta.

Tí varð eg sera spent uppá at hoyra Teit á G-festivalinum, og eg má siga, at tað sum heild varð ein sera jalig(!) uppliving. Við so dugnaligum tónleikarum rundan um seg sum m.a. Búa Dam, Michael Black og Una Árting er tað nærum eisini dømt til at eydnast. Teitur hevði eisini eitt lítið kvinnukór aftrat sær, men hóast tær í litføgrum kjólum frískaðu pallin upp varð teirra sanggóðska heldur ivasom í støðum.

Meginparturin av sangunum, ið Teitur framførdi á G! vóru av hansara seinastu fløgu "káta hornið". Her vóru nøkur løg, millum annað "eg eigi ongar pengar" og "Havnin er ein lítil bygd", ið settu lív í áhoyrarnar, ið sungu við. Eisini framførdi Teitur "tokspor", ið hann sang eins guddómmiliga, ið hann ger á fløguni.

Tað má tó viðmerkjast, at tað var ein ávís andsøgn millum huglagið á fleiri av teim framførdu løgunum hjá Teiti og ta bakandi sólina og tann glaða ungdómin. Tað er ringt at finna nakað glaðari og jaligari enn ein føroying í sólskini. Tað einasta glaðari er kanska ein føroyingur í sólskin á G! við sandi millum tærnar. Í hesum høpi var tað eitt sindur malplacerað at syngja við til "sangir í moll"...

Men móti endanum av konsertini spældi hann nøkur løg av fløguni "Stay under the Stars". Millum annað "Louis, Louis". Og tá fekk framførslan veruliga luft undir veingirnar. Tónleikurin, sólin og hitin gingu upp í eina hægri eind, og fríggjakvøldið á sandinum fekk ta best hugsandi byrjanina.


Mynd: Sunva E. Lassen


Gunnar Guttesen


Guðrið Hansdóttir


SIC

Myndir: Sunva E. Lassen